# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ein gáva til føroyskan fótbólt

Talan var helst um størsta framstigið hjá føroyskum fótbólti í nærum 20 ár, tá Todi Jónsson í gjár kundi almannakunngera sínar ætlanir við danska Fremad Amager. Sæð burtur frá altjóða limaskapinum, so er hetta í serflokki nógv tann størsti møguleikin, sum nakran tíð er givin føroyskum fótbólti. Meira enn nakað annað, so er fótbóltslandsliðið andlit okkara mótvegis umheiminum, og tann umrøða, sum hetta hevur skapt, kann als ikki gerast upp í pengum.

At úrslitini ikki altíð eru eins góð, vita vit. Men kortini hevur tað verið lítið hugaligt at lisið útlendskar miðlar, nú úrslitini hjá landsliðnum hava verið í lakara lagi seinnu árini.

FSF og føroysku feløgini hava alla tíðina framt eitt miðvíst arbeiði til tess at menna føroyskan fótbólt, men avgjørt størsta stigið í so máta stendur Todi Jónsson nú fyri. Við ætlanunum um at skapa rúm fyri føroyskum spælarum á hægsta danska støði, kunnu vit væl verða vitni til, at Fremad Amager verður lopfjølin hjá fleiri ungum føroyskum spælarum. Bæði til donsku superliguna men eisini til enn størri avbjóðingar. Og tess fleiri slíkar spælarar vit hava, tess sterkari verður føroyska landsliðið.

Og tað sýnir helst eisini sanna hjartað, sum Todi hevur fyri føroyskum fótbólti. Ikki minst, tá hugsað verður um tað niðurgering og útspilling, sum hann í fleiri ár livdi við. Tí sýnir tað format, tá Todi kortini tekur hetta risa stigi. Eitt stig, har hann eisini sjálvur setur pening í vága. Sjálvandi er ætlanin eisini, at Fremad Amager – og harvið føroysku íleggjararnir forvinna pening. Men at sameina hetta við eini menning av føroyskum elitufótbólti er kanska størsta gávan, sum føroyskur fótbóltur nakran tíð hevur fingið.

**Sosialurin**

## Útjavningarskipan uttan útjavning



**RÓSA SAMUELSEN**
Føroya Kommunufelag

Í Dimmalætting 20. mars hevur Heðin Mortensen, sum eg skilji hann, eina áheitan á meg um at taka við læru av tí samanlegging sum er farin fram í Sunda Kommunu. Persónliga haldið eg at samanleggingin í Sundalagnum er fyrimyndarlig, og er hon sanniliga eisini í tráð við fatanina hjá Føroya Kommunufelag viðvíkjandi samanlegging, nevniliga at hon skal fara fram sjálvboðin. Fyrrverandi kommunurnar og ta fólkið í har búði, tóku avgerð um at kasta saman 1 januar 2005, og at grundleggja ta núverandi Sunda Kommunu. Eg ivist onga løtu í at henda støðutakan hevur styrkt økið við Sundalagið munandi. Tað er heldur einki dulsmál at eg sum borgarstjóri í Sandavágs kommunu eri fyri einari størri eind her hjá okkum, so er tað sagt.

Men lat okkum venda aftur til kjarnina í kjakinum seinastu vikurnar, um eina útjavningarskipan ímillum kommunur. Heðin Mortensen pástendur at Føroya Kommunufelag kemur við hálvlýstum pástandum um útjavning. Til hetta er bert at siga, at Føroya Kommunufelag einast hevur víst á at tað er stórur munur á inntøkugrundarlagnum hjá kommunum/økjum í Føroyum, og at hesin veruleiki í sjálvum sær ger tað neyðugt at viðgera hugtakið útjavning, og at fáa hetta lýst við fyrimunum og vansum.

Men kanska er hetta óneyðugt, tí KSF hevur eftir øllum at døma gjørt eina heildarlýsinga av einari javningarskipan, sum Landsstýri og Løgting og fjølmiðlar eru kunnaðið um. Havið umvegis leitiskipanir hjá Løgtinginum og bløðum leita eftir hesum tilfari men finni tað tíðanverri ikki.

Eg onnur við mær bíða tískil spent eftir at tann famøsa útjavningarskipanin hjá Heðini Mortensen veruliga sær dagsins ljós. Henda sera visjónera útjavningarskipan brýtur eftir øllum at døma radikalt við útjavningarskipanir ið vit kenna frá okkara grannatjóðum, hon er í veruleikanum nyttuleys og útjavnar ongar ójavnar.

## Vit mugu góðtaka ...



**FINNUR HELMSDAL**
løgtingsmaður

Tey orðini, sum løgmaður oftast hevur sagt sum løgmaður, eru: "Júmen, ogur mugu góðtaka støðuna, sum hon er. Ogur mugu góðtaka, at vit nú eina ferð eru undirgivin dønum". Her sipar løgmaður sjálvandi til donsku grundlógina, heimastýrislógina, yvirtøkulógina og uttanríkispolitisku heimildarlógina. Løgmaður góðtekur ikki bara hesar lógir fult og heilt, hann góðtekur eisini uttan at blunka, at tað eru danir, og bert danir, sum tulka hesar lógir og hvørjar avleiðingar tær skulu hava fyri Føroyar og føroyingar. Løgmaður vil, at vit skulu blint góðtaka tær lógirnar, líka mikið hvussu tær verða tulkaðar og hvør tulkar tær.

Hesi orðini: vit mugu góðtaka veruleikan, hevur landsstýrismaðurin í innlendismálum lært av løgmanni. Hvørja ferð hann leggur okkurt mál fyri tingið, og tingmenn ógvast við tað, sum danir krevja, so sigur Jacob Vestergaard: "Eg havi einki ímóti at málsøkið verður føroyskt, men vit mugu góðtaka veruleikan, sum hann er". Og so hendir einki annað, enn at samgongumenn endurtaka líka sum í kór: ...góðtaka veruleikan, ... góðtaka veruleikan, ...

Hvørki Jóannes Eidesgaard, Jacob Vestergaard ella nakar annar í samgonguni hevur so mikið sum nakra meining um ta mannminkandi og lítisverdu støðu, vit eru í hvat løggevandi og politiskum valdi viðvíkur. Tað syndri av rásarúmi, vit høvdu ognað okkum, hvarv sum døgg fyri sólini ta náttina, tá samgongan samtykti vanlukkuligu yvirtøkulógina og lógina um uttanríkispolitiksu heimildirnar. Tann lógin gjørdi ikki bara, at vit bakkaðu við ferð inn aftur í ríkisfelagsskapin og donsku grundlógina. Ta náttina vórðu Føroyar sementeraðar fast og djúpt niður í danska ríkið.

Hetta kom m.a. fyri ein dag, nú tingið fyrst í mars viðgjørdi krøv frá dønum um, at fleiri løgtingslógir skuldu broytast, og at greinar skuldu burtur úr løgtingslógunum og setast inn í donsku rættargangslógina. Danski rætturin í Føroyum kann ikki nýta ásetingar í føroyskum lógum. Danski rætturin í Føroyum kann og vil bert nýta ásetingar í donskum lógum. Hetta hóast vit longu hava havt ásetingar um rættargang í løgtingslógum, so sum stýriskipanarlógini. Tað er sum so einki odiøst í tí, at rætturin virkar sambært einari rættargangslóg. Men tað at til einkis gera føroyskar lógir, sum hava havt virknað í ár er, alt annað líka, ótrúliga óverdug, hetta er skomm, hetta hoyrir farnum øldum til. Men hvat ger løgmaður og hansara, jú, teir yppa øksl, og tað gera eisini allir samgongulimirnir. Eingin teirra kennir minstu skommina av, at vit verða alt meira kleyrað niður av kolonistahógvunum. Poul Michelsen hevur gjørt vart við støðuna hjá sendistovum okkara, og tøkk fái hann fyri tað. Men hann tykist ikki at latast um vón um tað, sum er veruliga orsøkin til alla miseruna. Nevniliga, at vit bæði ganga undir tær lógir, sum danir tvinga niður yvir okkum, og ganga treyta leyst undir teirra tulkingar av teimum.

Hvussu leingi vilja, orka og loyva vit slíkum? Tað er sjálvsagt ein spurningur um, hvørjar menn og kvinnur Føroya fólk velja inn á ting. Men kanska fara nokk so nokk so nógv at hugsa seg um eina, tvær ella tríggjar ferðir, tá tað kemur fyri ein dag, at danir eisini sýta fyri, at uppskotið um stjórnarskipan verður lagt fyri tingið. Hetta tí, vit skulu og bert skulu anda, hugsa og virka sambært tí, sum samgonga hevur góðtikið. Nevniliga teimum lógum, sum niðurbinda og sementera okkum inn í danska ríkið.

Latið okkum taka avleiðingarnar av hesi vanæruligu støðuni, vit eru í. Latið okkum taka lógvatak og stevna móti fullveldinum. Vit eiga ikki at góðtaka ein veruleika, sum vit hvørki unnast við trívast við.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Bjarta Joensen bjarta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Eyðhild Jacobsen eydhild@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.